# Tann føroyska vikarstovan



Føroya Care vikarstovan byrjaði 07.07.2007. Hetta er ein vikarstova sum er fyri alt heilsuøkið í Føroyum. Tørvurin á vikarum er stórur innan heilsuøkið; men enn hevur ongin víst áhuga fyri hesi vikarstovu, ið er tann einasta sum hevur sáttmála við fagfeløgini á føroyska arbeiðsmarknaðinum og lúkar tær treytir ið Heilsumálaráðið hevur sett. Í nærmastu framtíð hava tey sáttmálar við onnur fagfeløg á heilsuøkinum í Føroyum, tað eru tey glað fyri. Men harmuligt er at vikarstovan ikki er komin í gongd enn her á landi .Tí síggja tey einasta møguleika fyri at koma at virka, at fara í onnur lond, teir sátmálar eru eisini klárir í næstum. Áhugin er stórur hjá teimum, ið eru tilmeldað vikarstovuni, eisini at koma til onnur lond at arbeiða. Tað eru tey fegin um tí teimum loyngist eftir at koma í gongd. Øll eru vælkomin at seta seg í samband við Føroya Care ella støkka inn á gólvi til eitt prát.


























